## UTTAN ÚR HEIMI

# Vakurleiki fyri friði

**31. mai verður ein vakurleikakapping ímillum tjúgu ísraelskar og seks palestinskar kvinnur**

FRIÐARARBEIÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað eru ikki øll ísraelsfólk, sum eru hermenn ella løgreglumenn. Tað finnast eisini vanlig fólk, sum vilja liva í friði við okkum, sigur Grace Karaa. Hon er kristin palestini og er ein av teimum seks palestinsku kvinnunum, sum skulu kappast við tjúgu ísraelskar kvinnur um, hvør er tan vakrasta.

Í síðstu viku var Grace Karaa í Jerusalem og fyrireikaði seg til kappingina. Men hon mátti fáa undantaksloyvi frá ísraelska herinum til at sleppa yvir um tann umstrídda trygdarmúrin.

Ísraelska felagið, sum skipar fyri vakurleikakappingini, dylir ikki fyri, at hon er eitt friðartiltak og skal vísa, at ísraelsfólk og palestinar kunnu samstarva, sjálvt um ein múrur er ætlaður at skilja tey sundur.



*Myndir av útlendskum gíslum fáa hjálparfólk at rýma úr Irak. Vantandi politisk fyrireiking er orsøkin, og George W. Bush, forseti, hevur einsamallur ábyrgdina, siga amerikanskir eygleiðarar*

*Mynd: Reuters*

# Hjálparfólk rýma úr Irak

**Tær nógvu burturflytingarnar í Irak teir seinastu dagarnar hava elvt til, at ræðsluslignir útlendingar standa í bíðirøð fyri at sleppa úr landinum. Samstundis hava amerikanararnir mist tamarhaldið á støðuni**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hildið verður, at einir 44 útlendingar eru vorðnir burturfluttir í Irak teir seinastu dagarnar. Um páskahalguna vórðu níggju amerikanarar, átta russar og tríggir kekkar rændir og burturfluttir.

Frammanundan sótu tríggir japanar gíslar hjá einum víðgongdum bólki, og myndirnar av teimum trimum japanunum hava elvt til ræðslu ímillum tey útlendsku hjálparfólkini, sigur sjónvarpið CNN.

Men burturflytingarnar fara ikki bara at ávirka hjálpararbeiðið. Fyrrverandi amerikanski generalurin Daniel Christman sigur við CNN, at tær útlendsku íløgurnar í Irak fara at steðga, tí eingin fer at brúka pengar í einum landi, har alt er í einum ruðuleika, sigur hann.

Fleiri serfrøðingar hava teir seinastu dagarnar ávarað um, at tað restar lítið í, til borgarakríggj brestur á í Irak. Amerikanararnir hava næstan mist tamarhaldið á støðuni, og eingin dugir at siga, hvør skal hava eftirlitið, tá irakar formliga taka við valdinum í Irak tann 30. juni.

Amerikanska herleiðslan ætlaði at fáa ta nýskipaðu iraksku trygdartænastuna at hjálpa amerikonsku hermonnunum í bardøgunum við teir víðgongdu bólkarnar, men fleiri hermenn hjá trygdartænastuni hava sýtt fyri at hjálpa amerikanarunum, skrivar New York Times.

– Vit hava brúkt seks mánaðir til at skipa trygdartænastuna, men alt til onga nyttu, sigur ein kelda í verjumálaráðnum Pentagon við blaðið. Embætismaðurin í Pentagon ásannar, at tað hevur verið toliliga friðarligt í Irak teir seinastu dagarnar, men hann sigur, at tað er bara ein spurningur um tíð, nær ófriðurin brestur á aftur.

### Bush ábyrgdina

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at George W. Bush, forseti, noyðist at átaka sær alla ábyrgdina av tí, sum hendir í Irak Teir vísa á, at vánalig politisk fyrireiking í Washington er orsøkin til ófriðin.

Eitt gott dømi um hetta var, tá amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, nú ein dagin varð spurdur, hvør skal taka við valdinum í Irak, tá USA letur tað frá sær tann 30. juni.

– Ja, tað er ein góður spurningur, svaraði Paul Bremer.

# Frákoyrdur forseti stillar kanska uppaftur

**Herfyri var litavski forsetin, Rolandas Paksas, koyrdur frá, men hann kann verða afturvaldur longu í summar**

LITAVA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er ikki ov nógv sagt, at flestu litavar tóku undir við avgerðini hjá tjóðartinginum at koyra Rolandas Paksas úr forsetaembætinum, eftir at landsins hægstirættur var komin til ta niðurstøðu, at forsetin hevði brotið grundlógina, tá hann gav einum russiskum vinmanni litavskan ríkisborgararætt.

Russiski vinmaður forsetans hevur tætt tilknýti til russisku mafiuna, og litavsku myndugleikarnir vilja vera við, at tað var vinmaðurin, sum rindaði meginpartin av valstríðnum hjá Paksas.

Men sambært norska blaðnum Aftenposten kann tað væl henda, at Rolandas Paksas kemur aftur í forsetastólin at sita. Tjóðartingið hevur gjørt av at halda forsetaval í juni, og sambært blaðnum er tað als ikki óhugsandi, at tann frákoyrdi forsetin fer at stilla upp tá.

Sigurin hjá Paksas á forsetavalinum í fjør kom óvart á tey flestu. Hann fekk ikki stóran stuðul í býunum, men á bygd fekk hann nógvar atkvøður, og hildið verður, at tað fer hann eisini at fáa í summar, stillar hann upp.

Enn hevur Rolandas Paksas ikki sagt, um hann stillar upp, men hinvegin tykist longu nú greitt, at fyrrverandi forsetin Valdas Adamkus og tjóðartingsformaðurin, Algirdas Brazauskas, fara at stilla upp.



# Nú eiga vit Christian í Grótinum

**Eigararnir av Christiani í Grótinum hava keypt norska partin í skipinum fyri góðar 50 mio. krónur**

CHRISTIAN Í GRÓTINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Eigararnir av stásiliga nótaskipinum, Christiani í Grótinum, hava gjørt av at keypa norska partin í skipinum.

Christian í Grótinum er bygdur í Kili og kom í føroyska fiskiflotan í 1998. Talan var um eina dýra verkætlan og tí munaði tað væl, at norska felagið, Austevol, játtaði at seta pening í nótaskipið.

– Tað hevur allatíð verið ætlanin hjá okkum at keypa norska partin í skipinum. Nú hevur tað so eydnast at yvirtaka skipið heilt, og tað fegnast vit um, sigur Eyðun Rasmussen, ið er sonur Kristian Martin Rasmussen, útgerðarmann á Christian í Grótinum.

Eyðun Rasmussen leggur afturat, at tað var eitt ynski frá báðum pørtum, at føroyingar yvirtaka norska partin í Christian í Grótinum, og tí er als ikki talan um nakra ósemju millum P/F Christian í Grótinum og norska felagið Austevol.

### Dýr yvirtøka

Christian í Grótinum kostaði í 1998 góðar 160 mio. krónur at byggja. Norski parturin í verkætlanini var góðar 50 mio. krónur ella ein góður triðingur av kostnaðinum. Spurdur, hvussu dýra yvirtøkan fer at ávirka raksturin hjá Christian í Grótinum, svarar Eyðun Rasmussen, at raksturin sjálvsagt verður tyngri enn undanfarin ár, men reiðaríið hevur kortini góðar vónir um at fáa endarnar at røkka saman.

Eigararnir av Christiani í Grótinum hava heldur ikki nakra orsøk til at stúra ov nógv. Stásiliga nótaskipið hevur fiskað ómetaliga væl síðan 1998 og góði fiskiskapurin er eisini høvuðsorsøkin til, at føroyingar hava gjørt av at keypa norska partin í skipinum.

Hóast árið í fjør ikki hilnaðist eins væl og undanfarin ár, so letur Eyðun Rasmussen væl at.

– Vit høvdu einar 5-6 mio. krónur í avlopi í fjør og tað var væl minni enn í Í 2002( avlop á 17 mio. krónur, blðm). Í ár sær rímuliga væl út og eg vænti, at vit koma at fáa nøkulunda sama avlop í ár sum í fjør, greiðir Eyðun Rasmussen frá.

Christian í Grótinum fiskar í løtuni sunnanfyri á Munkagrunninum. Hitt skipið hjá reiðaríinum, Norðborg, landar í løtuni á Seyðisfirði í Íslandi.


*Rokfullarlastir og góður fiskiskapur er orsøkin, at P/F Christian í Grótinum hava keypt norska partin í nótaskipinum, Christian í Grótinum fyri 50 mio. krónur.*

*Mynd: Savnsmynd*




